Grundarsteinur

# SJÁLVSTÝRI

## Innihaldsyvirlit

Framtíðarstøða Føroya . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 243
Stjórnarskipan Føroya . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 244
Yvirtøka av málum og málsøkjum . . . . . . . . . . . 244
Búskapurin og heildarveitingin . . . . . . . . . . . . . . 245

# Framtíðarstøða Føroya

Løgmaður heitti á formenninar í politisku flokkunum um at verða limir í strategibólkinum fyri sjálvstýri, og tilnevndi Jóan Paula Joensen, professara og formann í stjórnarskipanarnevndini, til formann. Visjónin um sjálvstýri skuldi fevna um hesi trý høvuðsmálini:

- Stjórnarskipan fyri Føroyar
- Yvirtøkur av málum og málsøkjum
- Stigvísa minking í heildarveitingini

Strategibólkurin hevði torført við at finna felagsstev í hesum arbeiði og tí heitti løgmaður á formannin um at lýsa og meta um málini, sum hava verið umrødd. Tann frágreiðingin stendur niðanfyri.

## Frágreiðing frá formanninum

Føroyskur politikkur hevur í mansaldrar verið eyðkendur av spurninginum um samband og sjálvstýri, uttan at komið er til nakra varandi avklåring av hesum týdningarmikla spurningi. Tað sigur seg tí sjálvt, at tað hjá einum strategibólki, sum er mannaður við formonnunum í øllum flokkunum í Føroyum, vildi verið sera torført, fyri ikki at siga ógjørligt, at koma til eina semju um eina felags sjálvstýrisvisjón. Tað hevði verið gott, um allir flokkar í landinum høvdu kunna komið til eina semju um sjálvstýrisspurningin í Føroyum. Tað eydnaðist kortini ikki í hesum strategibólkinum at finna tað breiða grundarlagið fyri eini semju um sjálvstýri og framtíðarstøðu Føroya.

Hinvegin er tað jaliga hent, at allir politiskir flokkar á tingi hava tikið undir við, at arbeitt hevur verið við einum stjórnarskipanaruppskoti fyri Føroyar.

Formaðurin hevur tí tikið ta støðu ikki at koma við nakrari felags frágreiðing, men heldur sjálvur skriva saman tað, sum hann heldur, at bólkurin átti at kunna komið til



eina semju um, uttan at kortini nakar flokkur hevur ábyrgd av hesum skjali.

## Føroyskur samleiki

Tað man verða lítil ivi um, at føroyingar longu í fornari tíð hava kent seg sum eitt fólk, bundið at landinum, bygdini og ættarfólki sínum. Hugtakið tjóð er ikki komið teimum til hugs fyrr enn seinni. Hetta hugtak hongur neyvt saman við teirri tíð, tá tjóðskaparrørslan varð til sum fyribrigdi, og vanliga verður árið 1888 sett sum ein tíðarvarði í hesum sambandi. Tá fór ein tjóðskaparlig veking fram í fólki okkara. Føroyska fólkið fann seg sjálvt bæði í okkara fornu fólksligu mentan og í einum nýggjum skaldsligum hugaheimi, sum var til tá og sum lýsti oyggjar, sum høvdu fjøll og grøna líð. Hetta var okkara alfagra land og dýrasta ogn, og fóru vit at kenna okkum sum føroyingar serstøk tjóð, og Føroyar hava nú alt tað, sum eyðkennir eina tjóð.

Í teirri fyrstu tjóðskapartíðini stóðu fólk saman í leitanini eftir tjóðskaparligum ímyndum og í gleðini um at hava funnið ein felags samleika í einum politiskum sakloysi. Tá so tann politiski yrkadagurin kom við krøvum og hugmyndum um, hvussu land okkara skuldi stýrast og spurningar loysast, komu ymiskar meiningar undan kavi, ið gjørdu, at fólk fóru ymsar leiðir, og ikki kundu fylgjast longur. Tá hendi tað, sum mátti henda, politikkur kom í tjóðskaparrørsluna. Eisini komu politiskar gjáir – kanska óneyðuga breiðar – sum ikki var farandi um.

Uttan mun til, hvat ið eftir hetta hevur verið av ósemjum um mál, merki og aðrar tjóðskaparligar ímyndir, so er tað í dag ein veruleiki, at allir føroyingar standa saman um okkara tjóðskaparliga samleika, hóast tað framvegis er stórt spenni millum politisku flokkarnar í spurninginum um, hvussu langt farast skal á sjálvstýrisleið.

## Stjórnarskipan Føroya

Føroya Løgmaður fekk stutt fyri jól í 2006 handað eitt álit um eina stjórnarskipan, sum allir flokkar hava verið við til at gjørt. Við hesum uppskoti hevur Føroya fólk fyri fyrstu ferð fingið eitt ítøkiligt uppskot til eina stjórnarskipan, sum fólkið kann geva sær sjálvum, eftir at hon fyrst er vorðin viðgjørd á tingi. Hetta er ein søguligur møguleiki til at koma fram til eina tjóðskaparliga semju, sum gevur okkum endaliga rættin til land okkara og at skipa okkara viðurskifti, sum vit á fólkaræðisligan hátt ynskja tað.

Hetta er ein stjórnarskipan, ið skal verða grundarlag undir stýri okkara og verða tann fyriskipan, ið tryggjar frælsi, mannarættindi, trygd og trivnað okkara. Eingin sáttmáli ella lóg kann, tá stjórnarskipanin er samtykt, ávirka sjálvræði Føroya, slíkar avgerðir tekur bert Føroya fólk samsvarandi tí í altjóða rætti lýsta framhaldandi sjálvsavgerðarrætti Føroya fólks.

Landsins lógir og avgerðir eru bert tær, ið eru framdar á rættan hátt í landinum sjálvum og við fólksins vilja, tí eigur uppskotið til stjórnarskipan at verða sent út til fólkaatkvøðu. Tá hava vit tryggjað okkum endaligt sjálvræði í Føroyum.

Stjórnarskipanin skal, tá hon er samtykt, geva okkum møguleika fyri framhaldandi sáttmála um ríkisfelagsskap við Danmark, og møguleika fyri, at Føroyar verða eitt

sjálvstøðugt land. Um Løgtingið vil broyta samveldisstøðuna við Danmark, ella fara upp í eitt annað samveldi, skal tað gerast eftir teimum mannagongdum, sum ásettar eru í stjórnarskipanini.

## Yvirtøka av málum og málsøkjum

Málið má vera, at Føroyar yvirtaka og umsita øll mál og málsøki landsins í 2015. Í hesum sambandi verður Landsstýrið at gera neyðugar fyrireikingar, til tess at alt frá byrjan er tillagað og fer at kunna virka í einum føroyskum høpi. Yvirtøkulógin frá 12. mai 2005 hevur við sær, at øll málsøki kunnu yvirtakast, tá føroyingar sjálvir taka avgerð um tað. Tó fevnir yvirtøkulógin ikki um hesi økir: stjórnarskipan, heimarætt og hægstarætt danska ríkisins, uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikkur og gjaldoyra og peningapolitikkur. Ræði á hesum málsøkjum verður at taka, um so er, at føroyska fólkið tekur avgerð um at loysa Føroyar frá danska ríkinum.

Fyrisitingin skal á øllum økjum skipast so, at hon hóskar til eitt lítið samfelag sum Føroyar við ábyrgd fyri landi og borgara. Hon skal tí verða einføld, kvik, liðilig, opin og ódýr. Eingin ivi skal verða um, hvør hevur skyldu og ábyrgd.

## Búskapurin og heildarveitingin

Málið má vera, at peningaliga heildarveitingin úr Danmark minkar so líðandi soleiðis, at hon er burtur í 2015.

Ein vitanardyggur, kreativur, nýskapandi og ein frælsur sjálvberandi búskapur er sjálvt høvuðsgrundarlagið undir framtíðarstøðu Føroya og føroyskum frælsi. Fólkið sjálvt og skapanargávur tess er okkara størsta tilfeingi. Skipað skal verða fyri eini miðvísari øking av kunnleika fólksins frá fólkaskúla og til hægri útbúgvingar við støði í kunnleikatøkni, persónligari vitanarmenning og fyriskipaðari og frælsari gransking. Hetta skal áhaldandi lynna undir nýskapandi arbeiðsmøguleikum, búskaparligari menning og sosialari vælferð í landi okkara.

Eitt er framleiðsla burtur úr náttúrutilfeingi okkara, men eitt lítið fólk sum okkara eigur eisini at framleiða førleika í víðastu merking, kunnleika, upplivingar og mentan, ið ikki bert er samleikaskapandi, men sum eisini kann umsetast á einum marknað – bæði á heimamarknaðinum og til heimsmarknaðin, har vit standa trygt og eiga okkara luti í alheimsgerðini.

Meiningarnar um, hvønn týdning heildarveitingin hevur havt fyri føroyska búskapin, eru ymiskar. Heildarveitingin kann verða kveikjandi ella doyvandi fyri búskapin alt eftir, hvussu hon verður brúkt. Tað er skil í at eyðmerkja heildarveitingina eins og avkastið av einskiljingum í eini skiftistíð til undirvísing, heilsu og vælferð. Vinnan skal hinvegin klára seg uttan stuðul. Heildarveitingin úr danska ríkiskassanum eigur tí at minka í samsvari við øktan búskaparligan vøkstur, og so hvørt mál og málsøki verða yvirtikin og goldin úr landskassanum.

*Jóan Pauli Joensen, professari*
*formaður*